

Mynd: Sunva Ey. Lassen

*Í summar hevur Høgni Reistrup roynt seg sum fjølmiðlamann á Degi og Viku*

# – Eydnuna kanst tú ikki googla teg til

**Høgni Reistrup hevur fyri stuttum givið út sína fyrstu fløgu, Hugafar á ferð. Vit hava hitt unga havnarmannin og prátað um at leita eftir eydnuni. Um býin við ánna. Um at kava í føroyska málið. Og sjálvandi um at koyra við hjólbøru úti í Nólsoy**

TÓNLEIKUR

*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Vit hava sett okkum við einum kaffimunni á einari hugnaligari kafé í býnum. Tey, sum kenna Høgna, vita, at hann er ein sera dámligur og fryntligur persónur. Er niðri á jørðini og - fyri at nýta eina meiri sveimandi orðing - í samlag við seg sjálvan. Yvir kaffisutlið verður prátað um útisetalív og heimlongsul:

– Tað er ikki tað sama, sum tað var í gomlum døgum. Fyrr gjørdi vánaliga ferðasambandið, at tú vart avskorin og var sjáldan heima. Í dag eru Føroyar ikki meiri enn tveir tímar burtur. So eg haldi ikki, at ein kann tosa um heimlongsul á sama hátt í dag sum tá.

Tey flestu kenna Høgna sum karismatiska forsangaran í vælumtókta bólkinum Lawetz, ið gjørdi um seg fyri nøkrum árum síðani. Síðani tá er nógv hent, og í dag lesur Høgni hægri lesnað í Århus.

– Eg trívist væl í Århus. So væl, at eg havi skrivað ein sang um býin, sigur Høgni og vísir til lagið, Býurin við ánna, sum saman við níggju øðrum mynda Hugafar á ferð.

## Terji og trilliboran

Útgávan hjá Høgna, Hugafar á ferð, kom út fyri kortum. Upptøkurnar eru gjørdar í studio Oyravox, sum Terji Rasmussen, saman við øðrum, eigur og rekur úti í Nólsoy. Í tíggju tættpakkaðar, strævnar, men tó eisini spennandi januardagar, varð ljóð fest á band. Tónleikarar komu og fóru við Rituni, og ikki varð nógv sovið:

– Eg visti, at eg hevði bara 10 dagar, til skúlin byrjaði aftur, so tað var hektiskt til tíðir. Øll ljóðføri og allur sangur skuldi jú takast upp innan fyri tað tíðarskeiðið. Men tað var eitt stórt upplivilsi, og vit hugnaðu okkum.

## Høgni minnist aftur á tíðina:

– Terji plagdi at standa klárur við trillibøru niðri við keiina, tá ið okkurt tungt skuldi flytast frá Rituni niðan í upptøkuhølini. Og so fóru vit sjaggandi við gittaraforstyrkjara í trillibøruni og heilsaðu upp á fólk á vegnum.

## At leita eftir eydnuni

Hugafar á ferð er eitt savn av inniligum løgum, ið øll eru á føroyskum:

– Føroyskt er eitt sera vakurt mál, og eg lesi nógvan føroyskan skaldskap. Men ofta brúkar man bara tey somu orðini. At hyggja, at hugsa og so framvegis. Men tað er so nógv goymt í okkara máli. Tað ræður um at leita eitt sindur djúpari og brúka tað.

Og tað er ikki bara í føroyska málhavinum, málfimi yrkjarin leitar. Leitan eftir eydnuni er eitt afturvendandi tema í tekstunum hjá Høgna:

– Eydnan er so nógv. Millum annað at spæla tónleik, ger meg eydnuríkan. Men tað er ikki nakað konkret. Tað er ikki nakað, sum tú kanst googla teg fram til. Tað eru nakrar løtur í mínum lívi, har eg kenni meg eydnuríkan, har lívið er ordiliga gott. Og tað eru hesar løturnar, ið eg royni at fanga.

## Ólavsøkan

– Skal eg vera heilt erligur, so sigur ólavsøkan mær ikki tað stóra. Tað er ikki soleiðis, at eg telji niður ella nakað. Men tað er altíð hugaligt at møta fólki, sum tú ikki hevur sæð í langa tíð. Og serliga nú, tá ið man býr uttanlands.

Við blásarum, strúkarum og fullum orkestri fer trubadururin at spjaða vakrar tónar inni í Miðlahúsinum á ólavsøku. Og tað verður ein góð konsert:

– Fólk kunnu vænta sær eina góða konsert, tori eg at siga. Allir tónleikararnir á fløguni vera við, so tað fer at ljóða nøkulunda sum á fløguni, sigur Høgni at enda, áðrenn vit gjalda fyri kaffið og fara hvør til sítt.